## ÚT AT KOYRA

## Jaguar X-Type



Nýggi Jaguar við loyninavninum X400 kemur á marknaðin í summar sum Jaguar X-Type. V6 motorarnir verða ávikavist 2,5 ella 3,0 litrar og permanent fýrahjólstrekk sum standard.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

## V6 diesel til Saab



Komandi heyst kann Saab 9-5 TDI leverast við einum 3,0 litur V6 turbodiesel motori við comon rail innspræning. Tað er GM-Isuzu, sum hava staðið fyri menningini av motorinum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Design virðisløn til Seat



Amerikanska bilblaðið “Automotive News international” hevur kosið Seat Salsa til ársins best designaða konseptbil. Samstundis fekk teknarin av bilinum, Walter de Silva, design virðislønina “Eurostar 2000” fyri at vera ársins besti bildesignari í Europa.

*Kelda: Motor Magasinet*

# Nýggjur og størri VW Golf er á veg

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Fyrsti VW Golf bleiv framleiddur í apríl 1974. Eftir at hava rundað 20 milliónir bilar kemur ein nýggjur Golfur í 2003, hóast nýggja modell røðin byrjar í 2002 við eini cabriolet útgávu.

### Størri bilur

Hjá VW verður arbeitt av øllum alvi við einum avloysara til núverandi Golfin, ið verður fimta VW Golf modellið síðan 1974. Bilurin verður nakað størri enn forgangarin, við tað at aksulfrástøðan verður longri og bilurin verður breiðari. Væntandi fær hann eisini nýggjan undirvogn við nýggjari fjaðraskipan.

### Fyrst sum cabriolet

Nýggi Golfurin kemur fyrst sum cabriolet, við toy galesju, í 2002. Samstundis kemur væntandi eisini ein Golf MPV, í stødd við Opel Zafira, við sjey sitiplássum. Hóast Golf kom sum avloysari fyri VW Bobluna, hevur hann verið ov dýrur til at verða ein beinleiðis Fólkavognur, ein bilur til alt fólkið. Men hann hevur verið ein slóðbrótari í sokallaða Golf-klassanum, og tann bilurin sum flestu bilmerkini kappast við. Eisini er VW Golf ein tíðarleysur bilur, sum er kendur fyri at halda góðan brúktbilaprís.

*Kelda: FDM / Motor*



*Í 2003 fær núverandi Golfurin ein avloysara, sum verður størri og fær væntandi nýggjan undirvogn.*

**Golf streymurin síðan 1974**

| | |
|---|---|
| Golf I | 1974 - 1983 |
| Golf II | 1983 - 1991 |
| Golf III | 1991 - 1997 |
| Golf IV | 1997 - 2003 |
| Golf V | 2003 - |

Nú eru meira enn 20 milliónir framleiddir

# Lexus RX300 – nú eisini í Evropa



BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Lexus er luksusmerkið hjá Toyota, sum í USA kappast við bilar sum BMW og Mercedes. Hóast Lexus RX300 er ein dýrur bilur, er hann sera væl móttikin í USA, har hann hevur verið at fingið síðan januar 1999. Nú fæst bilurin eisini í Evropa.

### Lexus RX300

Lexus RX300 er gjørdur til beinleiðis kapping við eitt nú BMW X5, Audi A6 Allroad og Mercedes M-Klassan. Hetta er ein luksus frítíðarbilur í fyrsta floks gjøgnumførdum kvaliteti, og góðum koyrieginleikum til góðar og vánaligar vegir. Í Danmark kemur ein Lexus RX300 at kosta umleið 800 túsund krónur sum persónbilur, og umleið 350 túsund, uttan moms, sum vøruvognur.

### Luksusbilur

Lexus RX300 hevur permanent trekk á øllum fýra hjólunum. Eisini hevur hann differentiali í miðjuni og antispinn á bakhjólunum, eins og EPS stabilitetskipan, sum gevur bilinum góðar off-road eginleikar. Innan er hann ein sannur luksusbilur, og hevur ein sera framkomnum automatgearkassa. Lexus RX 300 kann draga ein tungan viðfestisvogn, og verður tí nógv brúktur av fólki, sum hava hestar.

*Kelda: FDM / Motor*

## Lexus RX300

| | |
|---|---|
| Motorurin | 3.0 litur V6 bensin 201 HK |
| 0-100 km/t | 9.2 sek. |
| Bensinnýtsla | 7,7 km/l |
| Dekkstødd | 215/70-16 |
| Longd | 4,58 m |
| Breidd | 1,82 m |
| Hædd | 1,66 m |
| Eginvekt | 1700 kg |
| Totalvekt | 2275 kg |



## ÚT AT KOYRA

# Peugeot 607 HDI

## – luksusbilur við tí minst dálkandi dieselmotorinum




*Peugeot 607 er sin stórur, snøggur og rúmligur bilur, ið er ein sonn fragd at koyra*



*Bilurin, vit royndarkoyrdu, hevði Triptronic gearkassa*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tá nýggjasti Peugeot 607 alment varð sýndur fram á bilaframsýningini í Frankfurt í fjør, sást at designið var avbera snøgt. Nú vit hava bilin her, má ásannast at hann fult út varð sum vit væntaðu í allar mátar.

### Stórur, ljóðleysur og rúmligur

Peugeot 607 er sin stórur, snøggur og rúmligur bilur, ið er ein sonn fragd at koyra. Hann er so ljóðleysur, at tey, sum sita aftan og framman, lættliga kunnu tosa saman, hóast koyrt verður við nógvari ferð. Aircondition skipanin kann regulerast, soleiðis at hitin í kabinuni ikki nýtist at vera líka hjá bilføraranum og síðumanninum. Fyri at tryggja støðugan hita í kabinuni, mátar skipanin ferðina á bilinum saman við sólarljósinum, soleiðis at bilurin í brennandi sól kann koyra inn í eitt berghol, uttan at hitin broytist.

### Minst møgulig dálking

Møguleiki er at velja ímillum tríggjar motorar, ein 2.2 litur bensinmotor við 160 hk, ein 3.0 litur V6 við 210 hk, og tann nógv umtalaða 2.2 litur HDI (High Density Injection) common rail dieselmotorin við 136 hk. Bilurin, vit royndarkoyrdu, var ein HDI, við tí nýggja framkomna filtrinum, ið við eini eyka forbrenning reinsar teir smáu sótmolarnar burtur, og dálkingin verður so lítil sum til ber. Hetta saman við elektronisku stýringini av brennievni og luftblandingini ger, at bilurin altíð kraftar mest møguligt og dálkar minst møguligt.

### Tiptronic

Bilurin, vit royndarkoyrdu, hevði Triptronic gearkassa, har til ber at koyra við automatgearum ella at skifta sjálvur við at koyra undir gearstongina fyri at skifta millum hægri ella lægri gear. Bilurin er sera væl útgjørdur og hevur alt, sum ein kann vænta av einum bili í hesum klassanum. Listin yvir útgerð er so víðfevndur, at vit ikki kunnu nevna alt her. Har er til dømis dekktrýstsensorar, airbag framman, síðuairbag og síðugardinur til at verja høvdið í einum síðusamanstoyti, blunkljósini tendra við eina sera harða uppbremsing, regnsensorar til viskararnar og fartpilotur.

### Prísir frá kr. 289.000,-

Standardprísurin á 607 HDI útgávunu er kr. 370.000,-. Men ein 607 fæst við 2,2 litrar bensinmotori, ið kostar frá kr. 289.000,- við næstan somu útgerð sum HDI útgávan. Peugeot 607 verður framleiddur eftir ein nýggjari skipan, ið gevur kundanum møguleika fyri at fáa bilin uppbygdan eftir egnum ynski.




*Peugeot 607 sær gott út við 17” alufelgum*

## Peugeot 607 2.2 HDI

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 2,2 litur HDI 16V 136 hk turbodiesel við common rail innspræning |
| 0-100 km/t | 12,1 sek. |
| Oljunýtsla | 13,9 km/l |
| Dekkstødd | 225/50-17 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 4,87 m |
| Breidd | 1,83 m |
| Hædd | 1,45 m |
| Eginvekt | 1525 kg |
| Totalvekt | 2125 kg |
| Prísur | kr. 405.000,- við Tiptronic og 17” alufelgum |
| Søluumboð | P/F Meinhardt Arge v/Oyggjarvegin FO-100 Tórshavn Tlf. 316161 |